# Stytt gerðabók hjá Hvalbiar sóknar kommunu hin 09. febr. 2015

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Magni Bertholdsen, Eyðfinn Debes, Martin í Nesi og Niels J. Thomsen. Jóhan Eli Poulsen var ikki heima.
Formaðurin bað um loyvi at taka trý mál við aftrat – hetta varð játtað og koma tey á skránna sum mál nr. 7, 8 og 9.

Fundurin varð settur kl. 17.30.

1. **Umsókn um stuðul til útgávu av bók um prestagarðarnar í Føroyum.**
   Søkt verður um stuðul til útgávu av bók um prestagarðarnar í Føroyum. Samtykt varð ikki at stuðla útgávuni.

2. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Parkinsonfelagnum.**
   Felagið arbeiðir við upplýsing v.m. fyri sjúklingar og avvarðandi og søkir um stuðul til hetta arbeiðið. Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 5.000,-.

3. **Umsókn um stuðul til námsferð frá 8. flokki í Hvalbiar skúla.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 500,- pr. næming og lærara eins og undanfarin ár.

4. **Umsókn um stuðul frá Suðuroyar Svimjifelag.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla felagnum við kr. 10.000,-.

5. **Til ummælis – sundurbýti av matr. nr. 14a til samanlegging við matr. nr. 39a.**
   Søkt verður um loyvi at býta uttangarðsjørðina á matr. nr. 14a frá fyri at leggja hesa saman við matr. nr. 39a. Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini.

6. **Dagføring av byggisamtykt og bygdaskipanarkortum.**
   Í sambandi við dagføring av bygdaskipan fyri Hvalba, Nes og Sandvík, er Kári Thomsen komin við frágreiðing og tilboði hesum viðvíkjandi. Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum.

7. **Góðkenning av roknskapi fyri 2014 hjá Hvalbiar skúlabókasavni.**
   Roknskapurin fyri 2014 hjá bókasavninum varð einmælt samtyktur.

8. **Umsókn um stuðul í sambandi við ferð og rokning fyri konsert frá Musikkskúlanum.**
   Samtykt varð einmælt at gjalda kr. 5.000,- fyri jólakonsertina í Hvalbiar kirkju, men í sambandi við ferðina til Sardinia, varð samtykt ikki at stuðla.

9. **Skriv frá borgara viðv. stiki.**
   Søkt verður um loyvi at flyta stik vesturi á Drátti út móti vegnum. Samtykt varð at siga frá, at kommunan ikki kann játta hesum.

10. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**
    a) Tekniska nevnd: Skriv frá borgara viðv. gøtuljósum út í Nes.
    b) - Skriv viðv. vatni, ið rennur inn á grundstykki.
    c) - Skriv viðv. kloakkviðurskiftum.

11. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**

- Skriv frá borgara viðv. gøtuljósum:
  Samtykt varð einmælt, at Tekniska nevnd kannar málið nærri.
- Skriv viðv. vatni, ið rennur inn á grundøki:
  Borgarar heita á kommununa um at beina vatnið burtur, ið rennur inn á teirra grundøki. Samtykt varð at loysa trupulleikan í samráð við John Hammer, arbeiðsformann.
- Skriv frá borgara viðv. kloakkviðurskiftum:
  Hetta mál varð viðgjørt á bygdarráðsfundi í mai 2013, har niðurstøðan var, at Tekniska nevnd skuldi fara á staðið saman við John Hammer. Samtykt varð at fara á staðið einaferð enn.
- Byggiloyvi á matr. nr. 389a:
  Samtykt varð at fáa Umhvørvisstovuna á staðið at seta mark í, áðrenn endalig støða verður tikin.

**Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**

- Viðv. neystaplássunum í Nesi:
  Eyðfinn spurdi bygdarráðið um møguleikan at tosa við eigarar av neystagrundini matr. nr. 74 fyri at víðka um økið til neystaplássini og somuleiðis at gjalda tann meirkostnaðin fyri at grava út, ið stendst av hesum. Samtykt varð einmælt at taka undir við hesum.

**Trivnaðarnevnd (framløga Rúni Thomsen):**

- Barnaansing í kommununi – kostnaður:
  Samtykt varð at lækka gjaldið hjá øllum børnum í dagrøktini við kr. 200,- um mánaðin og at goldið verður fyri 11 mánaðir um árið.

**Fíggjarnevnd (framløga Trúgvi Gudmundarson):**

- Dagstovnur í Hvalba:
  Fíggjarnevndin hevur viðgjørt ráðgevingarsáttmálan í sambandi við bygging av barnagarði á matr. nr. 145a í Hvalba. Fíggjarnevndin mælir bygdarráðnum til at skriva undir sáttmálan við Tummas Niclasen. Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum frá nevndini.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.45

| | | |
|---|---|---|
| Trúgvi Gudmundarson | Rúni Thomsen | Magni Bertholdsen |
| Eyðfinn Debes | Martin í Nesi | Niels Jacob Thomsen |